**Træ vindeygu**
**Kjarnutræ, mahogny og eik**

Øll hesi træ-sløg hava somu møguleikar. Tvs at tey verða framleidd  júst sum tú ynskir. Her eru víst nøkur dømi fyri at tryggja at tú sær so nógvar møguleikar sum gjørligt, so at tú kanst fáa júst tey vindeygu tú ynskir.

| | |
|---|---|
|  |  |
| Vindeyga við “almue” | Vindeyga uttan “almue” |

| | |
|---|---|
|  |  |
| Mynd ið vísur at vindeygu okkara fáast í ymiskum litum, umframt at ein kann fáa boða træpartí | Nærmynd ið vísur síðuhongt vindeyga við hvíttlakkeraðum alu-drypplista |

| | | |
|---|---|---|
|  |  |  |
| Drypplist úr alu, hvíttlakkeraður | Drypplist úr mahogni, oljuviðgjørdur | Drypplisti úr alu, ráur |

| | |
|---|---|
|  |  |
| Flagg vindeyga (Dannebrog) við 4 síðuhongdum rammum. Ofta eru ovaru rammurnar topphongdar | 2 gløs, ovara fast og niðara toppstýrt. (sí munin millum toppstýrt og toppsving á síðu 4 ) |

| | |
|---|---|
|  24 mm álímaðir listar |  44 mm gjøgnumgangandi sprossar |
| 24 mm álímaðir listar  | 44 mm gjøgnumgangandi sprossar  |

| | |
|---|---|
|  |   |
| Hús við skrápartí | Hús við føstum og vindeygum at opna |

| | |
|---|---|
|  |  |
| Vindeygu ið vísa "toppsving". Tvs. at vindeyga kann koppa runt so at t.d. útsíðan kann vaskast innanífrá. | Góðkend barnasikring |

| | |
|---|---|
|  |  |
| 25 mm listar á glas, frá innsíðu. Eisini sæst "alu í glas", ið eftir ynski kann setast inn í glasið, so tað gevur fatan av gjøgnumgangandi listum, umframt at hetta styrkir glasið. | 12 gløs har 1 opnar toppsving. Øll gløsini við brúnum alu drypplista |

| | | | |
|---|---|---|---|
|  |  |  |  |
| Síðuhongt vindeyga.<br>Vælegna sum bjrgingarop. Topp og síðuhongd vindeygu eru bíligari enn toppstýrd og toppsving | Topphongt vindeyga.<br>Topp og síðuhongd vindeygu eru bíligari enn toppstýrd og toppsving | Toppstýrt vindeyga.<br>Toppstýrt er bíligari enn toppsving. | Toppsving, tvs at<br>útsíðan kann vaskast innanífrá |

| | |
|---|---|
|  |  |
| Hurðin omanfyri hevur 3 fyllingar, 1 ráglas og 24 mm listar á glasi | Henda hurðin hevur lodrættar fresningar og "diamantglas" |
| Hurðar verða gjørdar, sum tú ynskir. Hvørki standard snið ella stødd. Tú setir saman við gløsum, listum og fyllingum, sum tú vilt. Allar hurðar hava 3 pkt. lásmekanismu. Hondtak og cylindari fylgir við! | |

**Brot úr lógini um bjargingarop (rýmingarleið)**

6. Bjargingarviðurskifti.

6.1. Bjargingarop.

6.1.-1 Bjargingarop eru vindeygu, lemmar og dyr íútveggi og tekju, har fólk kunnu bjargast út, og har eisini bjargingarfólk kunnu sleppa inn.

6.1.-2 Sløkkiliðsfólk skulu kunna sleppa framat bjargingaropum, t.d. við stigum. Rimar, vindfang, sólskermar o.a. mugu ikki vera ein forðing fyri at síggja ella nýta bjargingarop.

6.1.-3 Bjargingarop skulu lættliga og uttan nakra forðing kunna latast upp og skulu kunna standa víðopin, so slepst um tey bæði út og inn.

6.1.-4 Bjargingarop skulu vera íminsta lagi 60 cm høg og 50 cm breið. Tó skal hædd og breidd tilsamans vera ikki minni enn 150 cm. Er hæddin frá lendi upp til bjargingarop minni enn 200 cm, kann hæddin á sjálvum bjarginaropinum vera 50 cm. Er hæddin frá lendi upp til bjargingarop í tekju meiri enn 9 m, skal hæddin ásjálvum bjargingaropinum vera ikki minni enn 80 cm.

6.1.-5 Íbygningum, har tað er hægri enn 9 m millum lægsta jørðildi og bjargingarop íovastu hædd, skulu bjargingarop íøllum hæddum, uttan ítekju, vera dyr, vippuvindeygu, síðuhongd vindeygu, lúkur ella dragivindeygu við opum í minsta lagi sum ásett í-4.

6.1.-6 Frá gólvi upp til undirkant á bjargingaropi skal ikki vera hægri enn 120 cm.

6.1.-7 Áloftum har gólvið er hægri enn 5,5 m (2 hæddir omanfyri) lægsta jørðildi, skulu bjargingarop ítekjum og kvistum, vera soleiðis háttað og sett, at tað, mált vatnrætt frá takskeggi inn til niðara kant ábjargingaropi, ikki er longur enn 1,4 m. Hevur opið sama hall sum tekjan (takvindeygu), skal innandura vera íminsta lagi 20 cm vindeygakarmur, ella trin ikki hægri enn 80 cm yvir gólvinum og ímesta lagi 40 cm niðanfyri bjargingaropinum.

8.4. Bjargingarviðurskifti.

8.4.-1 Búðstaðarhøli og køkar skulu hava dyr beinleiðis út ella bjargingarop samb. 6.1.. Hæddir upp til bjargingarop samb. 6.1.-6 kunnu mátast frá føstum innbúgvi t.d. borði, ið stendur undir bjargingarvindeygunum. Borðplátan skal tá vera minst 50 cm breið.

8.4.-2 Kravið um bjargingarop - ella vindeyga eins og ásett í-1. kann verða fráfallið, um tað ávísa rúmið hevur beinleiðis samband við íminsta lagi 2 onnur rúm, sum hava bjargingarop og sum ikki standa ísambandi hvørt við annað.

8.4.-3 Tilkoyringarvegir og øki til bjargingar skal vera eins og ásett í6.2..